# Øssur og stjørnurnar

**15 ára gamli NSÍ spælarin og Arsenal viðhaldsmaðurin fekk góðan fong, tá ið hann mikukvøldið var í leiklutinum sum myndamaður**

HEIMSSTJØRNUR OG NSÍ DRONGUR

*Jóannes Hansen*
*FOTO: Øssur Dalbúð*

Hann hevur spælt fótbólt, síðani hann dugdi at ganga, og síðani hann var lítil smádrongur hevur hann hildið við Arsenal. Tað hevur ikki altíð verið so hugaligt, tá ið tey flestu í nærumhvørvinum hava hildið við Manchester United og kanska Liverpool. Men nú er tað hugaligt at vera Arsenal viðhaldsmaður.

Á franska landsliðnum eru tríggir Arsenal spælarar. 15 ára gamli Øssur Dalbúð í Runavík - tað er hann, sum er umrøddur omanfyri - vildi fegin koma tætt at teimum trimum, táið teir vóru í Føroyum. Týsdagin bað hann um kjans á manningini hjá Sosialinum mikukvøldið. FSF aðalskrivarin var lagaligur, so hetta bar til, og úrslitið av virkseminum hjá unga NSÍ álopsspælaranum og Arsenal viðhaldsmannininum eru myndirnar á hesi síðuni.

Saman við einstøkum øðrum fjepparum var Øssur á Hotel Føroyum, tá ið franska landsliðið fór avstað til landsdystin. Har hitti hann Henrik Larsen, venjaran hjá føroyska liðnum, sum hann varð avmyndaður saman við. Eitt umboð fyri franska fótbóltssambandið var ikki so fegið um, at myndir vórðu tiknar, men Øssur fekk mynd eitt nú av Thierry Henry, sum hann heldur serliga nógv av.

Eftir dystin var hann millum fronsku og føroysku tíðindamenninar, sum tosaðu við og tóku myndir av fronsku spælarunum.

Øssur greiðir soleiðis frá:

– Hetta var orduliga spennandi. Fyrst kom Vieira út, og so fóru allir yvir til hansara. Eg stríddist fyri at sleppa tætt at honum, og tað eydnaðist. Tá ið so Henry kom út, lupu allir yvir til hansara. Eg visti, at Vieira er ógvuliga stórur, men eg var ikki greiður yvir, at Henry og serliga Robert Pires eru so stórir. Pires kom síðst. Allir vildu tosa við hann eisini. Hann var í keppi, og hann hevði góða tíð. Eg hevði tikið Arsenal troyggjuna hjá mær og ein tusj penn við, og hann skrivaði á troyggjuna. Tíverri bar tað mær ikki til at taka bílæt av tí.

*Hvat annað legði tú til merkis?*

– Teir vóru fittir og avslappaðir. Tá ið teir fóru av Hotel Føroyum og í bussin, tosaðu teir allir í fartelefon. Teir høvdu allir sama slag av telefon. Tær sóu orduliga flottar út. Eg giti, at tær vóru frá onkrum sponsori.

Øssur Dalbúð fylgir væl við, hvussu tað gongst hjá Arsenal. Hann vónar, at tað fer at ganga væl hjá teimum í Europa Cup.

– Eitt, sum eg haldi, var merkiligt mikukvøldið, var, at Frakland hevði tríggjar liðformenn, og at tað vóru allir spælararnir hjá Arsenal. Vieira var liðformaður, inntil hann varð vístur út. So var Thierry Henry liðformaður, og tá ið hann varð skiftur út, gjørdist Robert Pires liðformaður.

Í dag klokkan trý fer Øssur at fylgja við, tá ið fronsku stjørnurnar fara at spæla við Arsenal á útivølli ímóti Fulham.



*15 ára gamli Øssur Dalbúð úr Runavík á Hotel Føroyum saman við føroyska venjaranum Henrik Larsen*




*Robert Pires undir keppi*



*Thierry Henry á veg í bussin uttanfyri Hotel Føroyar*



*Patrick Vieira gav sær góðar stundir at greiða frá reyða kortinum og úrslitinum, sum hann var ógvuliga fegin um*

# Lítil undirtøka

**Allir býráðslimirnir hjá Sambandsflokkinum uttan Schumann Hjaltalin hava játtað at stilla upp til kommunuvalið í november**

BÝRÁÐSVAL

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Suðurstreymoyar Sambandsfelag hevði hóskvøldið annan- og triðja uppstillingarfund til kommunuvalið. Fundurin metti ikki tað varð neyðugt við einum uppstillingarfundi afturat, og fundurin gav tí nevndini heimild at finna írestandi valevnini.

Formaðurin í felagnum, Annfinn Brekkstein, sigur, at áhugin fyri kommunuvalinum tykist vera lítil.

– Vit sakna áhuga millum okkara limir. Fólk eru bæði trek at møta upp og at stilla upp. Eg veit ikki um fólk eru valtroytt, men tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at áhugin undanfarin ár hevur verið væl størri, sigur Annfinn Brekkstein.

Formaðurin í Suðurstreymoyar Sambandsfelag vísir á, at níggju fólk hava játtað at stilla upp til kommunuvalið, meðan 5-6 ynskja longri umhugsunartíð, áðrenn tey taka endaliga støðu.

Annfinn Brekkstein ynskir ikki at nevna øll nøvnini á valevnunum, men váttar kortini, at býráðslimirnir, Beata L. Samuelsen, Heðin Mortensen og Høgni Mikkelsen eru á listanum.

Fjórði býráðslimurin hjá Sambandsflokkinum hetta valskeiðið, Schumann Hjaltalin, boðaði í summar frá, at hann tekur seg úr býráðspolitikki.

### Smærri støðini við

Annfinn Brekkstein greiðir frá, at Sambandsflokkurin arbeiðir við at fáa umboð fyri øll tey smærru støðini á sambandslistan í Suðurstreymi.

– Eg havi góðar vónir um, at vit fara at hava valevni frá teimum smærru støðunum á listanum. Ætlanin er at tosa við fólk um vikuskiftið og royna at fáa tey á listan, fortelur Annfinn Brekkstein.

Suðurstreymoyar Sambandsfelag væntar, at endaligi listin til kommunuvalið er liðugur seint í komandi viku.



Serfrøðingur um autismu í Føroyum:

# Í støðugari menning

**Lennart Pedersen starvast dagliga sum fakligur leiðari á einum sentri fyri autistar. Fimm tey seinastu árini, hevur hann verið í Føroyum og hildið fyrilestrar og skeið. – Hóast tað enn er eitt fitt petti eftir á mál, so hava tit seinastu árini ment tykkum nógv, sigur hann**

AUTISMA

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




*Lennart Pedersen heldur tað vera av alstórum týdningi, eisini at seta fokus á foreldur og systkin hjá autistum. – Um foreldini ikki fáa góða ráðgeving og eina holla vitan um brekið, sum barnið hevur, kunnu tey lættliga tálma menningini hjá autistiska barninum, uttan at vita tað*

*Mynd Jens Kr Vang*

### Týdning at hava tilboð

Lennart Pedersen greiðir frá, at autisma er eitt sosialt brek. Eingi sjúkueyðkenni síggjast á útsjóndini, men autistum vanta heilt frá móðurlívi ein grundleggjandi menniskjansligan førleika. Tey duga t.d. ikki at kenna røddina á móður síni, tey duga ikki at lesa andlitsbrá og megna ikki at hava eygnakontakt. Tey eru í stóran mun skorin frá umheiminum.

Lennart leggur tó dent á, at tað eru fleiri stig av autismu.

– Nøkur eru fullkomiliga isolerað í sínum egna hugaheimi. Tey duga ikki at hava kontakt við nakran, og mugu liva á stongdum bústovnum alt lívið. Onnur harafturímóti fáa havt eitt sosialt lív, tey megna at ganga í skúla, og onkur hevur enntá fingið eina universitetsútbúgving, greiðir Lennart frá.

Hesir seinnu, betri fungerandi autistarnir, verða nevndir asbergarar. Hóast teir betri eru førir fyri ay klára seg sjálvar, so mugu teir tó eisini hava hollan stuðul og ráðgeving, fyri at koma so langt.

Tað er sera týdningarmikið fyri lívsdygdina og lívsmøguleikarnar bæði hjá autistunum og asbergarunum, at tey fáa staðfest diagnosuna so skjótt sum yvirhøvur tilber. Og tá diagnosan so er sett, er alneyðugt, at tað eru nøkur tilboð til teirra tørv. Tað er týdningarmikið bæði fyri autistarnar sjálvar, men so sanniliga eisini fyri foreldur og systkin.

Lennart sigur, at samfelagið sum heild hevur ógvuliga lítið forstáilsi fyri autismu.

– Tey flestu, sum møta einum autisti, munnu halda, at tað er ein irriterandi óargaungi, sum er illa uppdrigin. Tey hava lyndi til at gerast irriterað. Tað ger autistin ótryggan, og fær hann at halda seg burtur frá fólki. Tað sama hendir við foreldrunum. Tey isolera seg eisini heima við hesum barninum, sum tey ikki kunnu hava við út ímillum fólk. So forstáilsi, lívsdygd og menning hanga avgjørt saman, sigur hann.

### Skeið og fyrilestrar

Lennart Pedersen, leggur tí dent á, at tað er so alneyðugt at kunna um og tosa um hetta brekið. Hann hevur verið í Føroyum í fimm ár á rað og hildið fyrilestrar, so hann veit hvussu støðan er í Føroyum.

– Foreldur, systkin og avvarðandi hava ofta nógvar ósvararðar spurningar, serliga her í Føroyum, tí her eru ikki so nógvir møguleikar at fáa kunning. Tað merki eg væl, tá eg komi hendanvegin, sigur hann. – Tey vita ikki hvar tey skulu fara við sínum spurningum.

Hesuferð er høvuðsendamálið við Føroyaferð hansara eisini, at hava eitt foreldra og systkinaskeið. Hetta verður hildið á Eiði í vikuskiftinum. Lennart sigur, at skeiðið verður í tveimum bólkum, har foreldur vera fyri seg og systkin fyri seg. Har verður undirvíst í autismu og prátað um, hvussu tað er at hava ein autist í húsinum.

– Vit skulu eisini hugna okkum saman. Tað er neyðugt fyri hini systkini, at tey sleppa at hugna sær saman við foreldrunum, har tey eru í fokus. So at tað ikki altíð verður brekaða systurin ella beiggin, ið er tað serliga barnið.

Víðari sigur Lennart, at pedagogar og lærarar eisini hava tørv á vegleiðing, tá tað kemur til autistar. Summir asbergarar eru jú so frægir, at teir kunnu vera í barnagarði og skúla saman við vanligum børnum. Teir hava tó framvegis eitt sosialt brek, sum lærarar og pedagogar ofta hava ilt við at takla.

– Børnini hava ein serligan tørv, og um ikki lærararnir fáa undirvísing í hesum brekinum, og hvussu teir skulu fara um hesi børnini, so gerst tað lætt eitt ógvuliga slítandi arbeiði, sum stressar og útbrennir. Lærararnir í Føroyum eru ógvuliga isoleraðir við sínum trupulleikum og sínum vantandi kunnleika um brekið, heldur Lennart.

Hann sigur, at hann veruliga merkir, hvussu stórur áhugin er, tá hann kemur til Føroya.

– Eg eri upptikin nærum allatíðina, men allíkavæl fái eg verri enn so nøktað tann tørvin sum er. Skeiðini eru fullteknað, og eg eri biðin at koma so nógvar staðir, at eg havi verið noyddur at siga nei til fleiri. So tørvurin í Føroyum er ógvuliga stórur, staðfestir hann.

### Á rættari kós

Danmark er fremsta landið í heiminum, tá tað kemur til vitan um autismu. Sofie skolen, sum er ein autistaskúli burturav, var heimsins fyrsti, og hann hevur 40 ár á baki.

Samanbera vit Danmark og Føroyar, heldur Lennart, at Føroyar eru eini 15 ár aftanfyri, hann sigur tó, at føroyingar eru komnir langt, bara tey seinastu fimm árini.

– Eg havi verið her einaferð árliga í fimm ár. Og tað er stórur munur á hvussu støðan var, tá eg var her fyrstu ferð og til í dag. Tá var bert eitt heim fyri autistar í landinum, og tað var fyri vaksin. Nú eru heimini fleiri, fyri nærum allar aldursbólkar og førleikin er nógv batnaður. Tit eru í støðugari menning og tað er absolutt at gleðast um, sigur Lennart.

Hann sigur seg eisini fegnast um, at tað eru tey somu fólkini, ið koma aftur og aftur á hansara skeið.

– Tað ger so ótrúliga stóran mun, um tað bert eru nøkur, ið leggja seg eftir at menna førleikan og fáa serkunnleika innan autismu, soleiðis at tey kunnu føra vitanina víðari. T.d. á skúlum ella barnagarðum, har eitt starvsfólk við vitan, kann læra hini. Ella at eitt foreldrapar kann læra onnur foreldur. Tað ger stóran mun, sigur Lennart.

Eisini heldur hann, at tað hevði hjálpt, um skipað var fyri regluligum fundum og skeiðum, við ymiskum serfrøðingum. Tað hevði skapað eitt net ímillum tey avvarðandi og allar fakbólkarnar, ið hava við autistarnar at gera. Tað verið seg lærarar, sálarfrøðingar, almannastovan o.s.fr.

– Tað er gott, at tit royna at seta fokus á trupulleikan. Tí hetta eru fólk, ið kunnu vera sera torfør at fáast við. Tey duga ofta ikki at siga hvat tey vilja og hvat teimum tørvar, og tað er týdningarmikið fyri teirra lívsdygd, at tey fólkini, sum eru um tey, hava eina ávísa vitan. Eg vil siga, at hóast tað enn er eitt fitt petti eftir á mál, so eru tit væl á veg, sigur Lennart Pedersen at enda.





